gult4 cyan4 magenta4 svart4



# Grønlendska ferðavinnan í menning

**Grønlendska ferðavinnan er í menning, sigur ferðavinnustjórin í Nuuk. Fleiri norðuramerikanarar koma til Grønlands, samstundis sum tilboðini til ferðafólkið gerast fleiri**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*





*Anders Vahl, ferðavinnustjóri í Nuuk, sigur, at serliga norðuramerikanarar hava fingið eyguni upp fyri Grønlandi sum ferðamannalandi*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Nuuk:** Grønlendska ferðavinnan er í menning, og ymsu økini hava lagt seg eftir sínum serligu tilboðum, sigur Ander Vahl, ferðavinnustjóri í Nuuk.

Hóast tað er langt og dýrt at ferðast eitt nú úr Danmark til Grønlands, eru flestu ferðafólkini í Grønlandi danir, greiðir Anders Vahl frá.

Hann sigur, at árliga koma eini 5.000-6.000 ferðafólk til Nuuk. Av teimum metir hann, at eini 2.000 støkka inn á gólvið hjá ferðaskrivstovuni.

Sigast skal, at ferðaskrivstovan í Nuuk liggur øgiliga illa fyri, tá hugsað verður um býin annars. Hon liggur so langt frá miðbýnum, sum tað slepst. Niðri í Kolonihavnini við sjálvan endan á vegnum. Einasta, sum er uttanfyri, er tann risastóri postkassin há jólamanninum. Og eisini hann er so mikið burturgoymdur, at leitast má eftir honum. Tann ferðandi, sum ikki hevur kort ella spyr seg øgiliga væl fyri, kann væl fáa trupulleikar við at finna bæði postkassan og ferðaskrivstovuna.

Anders Vahl, ferðavinnustjóri í Nuuk, sigur, at tað eru ikki »vanlig« ferðafólk, sum so, sum koma til Nuuk. Tey, sum vitja høvuðsstaðin, eru í stóran mun fólk, sum koma til ráðstevnur, handilsferðir og í ávísan mun eisini fólk, sum koma at vitja familju og kenningar.

Hinvegin fara flestu »vanligu« ferðafólkini út á bygdirnar, sigur hann. Og tilboðini eru eisini rættiliga ymisk í Nukk og aðrastaðni í Grønlandi, sigur ferðavinnustjórin í Nuuk.

Eitt nú fara flestu bólkarnir til Suðurgrønlands, sigur Anders Vahl. Har eru tað útferðirnar, sum fólk vilja royna. Bátstúrarnir eru sjálvandi eisini at fáa í Nuuk, men eitt nú tað, tey í Grølandi nevna »Heliskiing« er ikki so lætt at skipa fyri í Nuuk.

Talan er um túr, har flogið verður í tyrlu niðan á innlandsísin, og síðan staðið á skíð omanaftur. Innlandsísurin er ov langt burtur frá Nuuk til, at tað kann loysa seg at skipa fyri slíkum túrum. Tað verður stutt sagt ov dýrt í flúgving, sigur Anders Vahl.

Men sjálvandi verða eisini útferðir gjørdar úr Nuuk, sigur ferðavinnustjórin. Og eitt, sum nógv ferðafólk, ið koma til Nukk um summarið, vilja síggja, eru allar kúlubøkurnar, sum halda til til her á leiðini, sigur hann.

Um mánaðarskiftið juni-juli koma kúlubøkurnar í stórum tali og eru at síggja at kalla um alt havið her á Nuukleiðini, sigur ferðavinnustjórin.

Men eisini vanligir siglitúrar verða gjørdir í Godthåbsfjørðinum og har á leiðini. Her er vanliga talan um stuttar túrar, sigur Anders Vahl og leggur aftrat, at tá tosað verður um stuttar túrar í Grønlandi, plaga tey at meina við ein dagstúr.

Ferðavinnuskrivstovan í Nuuk, Nuuk Tourism, varð stovnað í 1995 sum partafelag og loysti tá kommunalu ferðavinnuskrivstovuna av.

Anders Vahl er stjóri í felagnum, sum umframt hann sjálvan hevur tvey starvsfólk í føstum starvi. Um summarið plagar eitt eyka starvsfólk at vera á skrivstovuni, sigur Anders Vahl. Haraftrat koma fleiri tímalønt so sum ferðaleiðarar.

# Ríkt mentanarlív í Katuaq

**Sera stórt virksemi er í grønlendska mentanarhúsinum Kaduaq í Nuuk. Í fjør vitjaðu umleið 110.000 fólk tey 254 tiltøkini, sum vóru í húsinum**

MENTAN
*Edvard Joensen*

**Nuuk:** Í miðbýnum í Nuuk liggur mentanarhúsið Katuaq (úttalað gad<u>u</u>akk).



Húsið veður sera nógv brúkt og var longu frá upplatingini fyri fýra árum síðan ov lítið, sigur stjórin, Juaaka Lybert.

Mentanarhúsið Katuaq er felagsstovnur, sum Norðurlandaráðið. grønlendska heimastýrið og Nuuk Kommuna eiga í felag, greiðir stjórin frá. Húsið varð tikið í nýtslu 15. februar 1997 og kostaði tá 110 milliónir krónur. Roknað varð tá við, at brúk fór at verða fyri fýra føstum starvsfólkum í húsinum.

Men tað helt ikki, kann ein róliga siga. Í dag, bara fýra ár eftir, at húsið varð tikið í brúk, eru starvsfólkini næstan tíggju ferðir tað, roknað varð við tá. 18 fólk eru í føstum starvi, meðan 17 tímalønt eru, sum arbeiða 37 tímar um vikuna, umframt tey, sum arbeiða tímalønt styttri tíðarskeið. Tilsamans eru tímalønt størv, sum svara til 20 fulltíðarstørv, og alt í alt verða 38 árslønir útgoldnar, sigur Juaaka Lybert, stjóri í Katuaq.

Juaaka Lybert tók við starvinum sum stjóri i Katuaq tann 1. juni 1999, tá hann loysti norðmannin Jan Kløvstad av. Jan Kløvstad hevði, sum kunnugt, verið stjóri í Norðurlandahúsinum í Føroyum, áðrenn hann fór til Grønlands at stjórna Katuaq.

## Lík men tó ymisk

Hóast Katuaq er mentanarhús við á leið somu uppgávum sum Norðurlandahúsið í Føroyum, er kortini avgerðandi munur á bygnaðinum, sigur Juaaka Lybert.

Norðurlandahúsið í Føroyum er norðurlendskt burturav. Soleiðis at skilja, at tað er Norðurlandaráðið, sum eigur. Meðan Katuaq verður roknað sum grønlendskt. Og eisini fíggingin av virkseminum er heilt øðrvísi, enn hon er í Norðurlandahúsinum, sigur Juaka Lybert.



*Juaaka Lybert, stjóri í Katuaq, á brúnni framman fyri stóru forhøllini í mentanarhúsinum*

*Mynd: Edvard Joensen*

Fíggjarætlanin hjá Katuaq er upp á 20 milliónir krónur í ár. Av hesum eru níggju milliónir almennur stuðul, meðan húsið sjálvt má syrgja fyri at fáa hinar 11 milliónirnar í kassan.

Og tað kann vera strævið, sigur stjórin. Men vísir í sama andadrátti á, at tað higartil hevur borið væl til.

Tvær góðar inntøkukeldur eru í sjálvum húsinum, greiðir hann frá. Tær eru biohøllin og cafeteria, sum rættiliga nógv fólk vitja.

–Og so ein hundans rúgva av umsóknum og bønarbrøvum, skoytir hann uppí.

Biohøllin er nógv mest vitjaða staðið í húsinum. Men eisini kaffistovan dregur heilt nógv fólk til. Og tað kemst av, at húsið liggur so væl fyri hjá fólki bara soleiðis at detta inn á gólvið. Tað liggur mitt í býnum. Vildi svara til, at um tað var í Havn, hevði tað ligið í Steinatúni.

Ikki er tað so galið kortini at vita sær, at húsið sjálvt fíggjar eini 55 prosent av rakstrinum, sigur stjórin.

Tað hevur tó ikki altíð gingið líka væl, sum tað ger beint nú, viðgongur Juaka Lybert, stjóri í grønlendska mentanarhúsinum Katuaq. Í 1999 hevði húsið eina skuld til Nuuk Kommunu upp á 1,4 milliónir, sum avtalað varð at avgreiða upp á trý ár. Men tað hevur gingið munandi skjótari við tí, sigur stjórin, og eitt sindur av erni er at merkja á røddini. Tí longu í fjør vísti roknaskapurin eitt avlop upp á 700.000,- krónur, sigur hann.

## Livandi boðberin

Katuaq merkir trumma, trummustavur ella eisini trummudansari.

Í grundini varð hildið, tá navnið varð valt, greiðir stjórin frá, at orðið Katuaq merkti ein trummustavur ella eisini ein trumma við stavi. Tað vil siga eitt amboð, sum ber ein boðskap.

Men eftir at málgranskarar hava kannað orðið nærri, eru teir komnir til ta niðurstøðu, at tað líka væl kann merkja fyribrygdið trummudansari. Tað vil siga bæði maður, trumma og stavur í einum. Og tað ger ikki boðskapin verri, heldur Juaaka Lybert, stjóri í Katuaq.

Húsið er teknað av donskum arkitektvirki og er sjónliga gjørt við norðlýsinum sum fyrimynd. Bylgjandi veggirnir lata ongan iva vera um, at tað er norðlýsið, teknarin hevur hugsað um, tá hann hevur fest strikurnar á blað.

Men eisini ísfjallið, sum grønlendingar kenna so væl, hevur inspirerað arkitektin. Húsið vísir seg líkasum at standa eitt sindur eftir løgg. Og tað er við vilja, greiðir stjórin frá, Tað ímyndar tað hallandi ísfjallið, og eisini sjálvur formurin á húsinum er mestsum tríkantaður, sum ísfjallið ofta er.

Nakað av orðaskifti var um, hvørt tað var brúk fyri húsinum, tá tað varð bygt, greiðir stjórin frá. Men tað orðaskifti er púra tagnað, nú tað vísir seg, hvussu dúgliga húsið verður vitjað.

gult5 cyan5 magenta5 svart5



# Vanligt seyðahald í Føroyum í vanda

**– Um nøkur ár er alt vanligt seyðahald fyribeint, har fólk hava eina trøð og nakrar seyðir til húsbrúk. Hetta verður avleiðingin um álitið hjá búnaðarnevndini verður sett í verk, sigur Føroya Óðalsfelag**

LANDBÚNAÐUR
*Áki Bertholdsen*



*Verður ætlaði landbúnaðarpoilitikkurin framdur í verki, fer tað at vera avmarkað, hvør kann ogna sær jørð. Samstundis fara nógv sum frálíður at missa jørð, tey hava havt. Hetta fer at føra við sær, at vanligt seyðahald fer í søguna, sigur Føroya Óðalsfelag. Her er tað Zakarias Wang, sum greiðir frá. Hin maðurin á myndini er Kári á Rógvi, formaður í Óðalsfelagnum*

– Verður hetta sett í verk, fara tað ikki at ganga nógv ár til alt vanligt seyðahald í Føroyum burturdottið, har fólk hava eitt sindur av jørð og nakrar seyðir til húsbrúk.

Tað er dómurin, sum Føroya Óðalsfelag fellur yvir álitið, sum búnaðarnevndin hjá Vinnumálastýrinum læt úr hondum fyri kortum.

Í álitinum eru uppskot sett fram um, hvussu landbúnaðarpolitikkurin í Føroyum skal vera í framtíðini.

– Hesi uppskot fara at beina fyri øllum vanligum jarðarbrúki í Føroyum og tað fer sostatt at beina fyri einum parti av okkara mentan, sum er líka gamal sum landið sjálvt, sigur Kári á Rógvi, lógfrøðingur, sum er formaður í Óðalsfelagnum.

Nú álitið frá búnaðarnevndini er komið, er Óðalsfelag Føroya farið undir eina rundferð kring landið at hava hoyringar um framtíðar landbúnaðarpolitikkin í Føroyum.

Tann fyrsta hoyringin var í skúlanum í Porkeri mikukvøldið, har eini 30 fólk vóru møtt.

## Smábrúk leggjast saman

Á fundinum í Porkeri greiddi Kári á Rógvi frá, at eftir álitinum frá búnaðarnevndini, skal endamálið við nýggja landbúnaðarpolitikkinum vera at leggja tey smáu jarðarbrúkini saman í størri eindir.

Í hesum sambandi mintist ein av fundarluttakarunum, at Bjørn á Heygum, sum hevði sitið í búnaðarnevndini, hevur sagt, at í framtíðini skal landbúnaðurin vera »annað enn mentan og frítíð«.

– Hetta er eitt uppskot, sum fullkomiliga brýtur við alla mentan og alla siðvenju, sum hevur verið í Føroyum, síðani landið varð bygt.

– Hetta er ein lóg, sum miðjar eftir, at skapa eitt ávíst slag av seyðahaldi, har hvørt jarðarbrúk skal hava millum 50 og 300 áseyðir. Tað merkir, at fyri tey allarflestu av okkum fer seyðahaldið at hvørva.

– Uppskotið er rættiliga fremmand fyri okkum, tí hon nevnir bara um garðar og fyri tað um onkur ein gyllin, ella tveir, ber neyvan til at tosa um garð. Men eftir hesum skal øll jørð, niður í hvørja hálva gyllin, tinglýsast sum landbúnaðarjørð og tann, sum hevur landbúnaðarjørð, hevur skyldu til at hava landbúnað.

Annars er bústaðarskylda fyri øll, ið hava fleiri enn 50 seyðir.

Tann sum brýtur hesar báðar reglarnar kann missa jørðina. Landsstýrismaðurin í vinnumálum kann so lata onkran annan leiga jørðina í eitt áramál upp á 10 ár ísenn. Tá ið 10 ár eru farin, kann leigumálið endurnýggjast um eigarin ikki prógvar, at tey viðurskifti, sum førdi til, at hann misti jørðina, eru avgerðandi broytt.

## Arvarætturin avmarkaður

Kári á Rógvu greiddi eisini frá, at eftir nýggja landbúnaðarálitinum, er tað avmarkað, hvør kann ogna sær jørð.

– Bara tann, ið er 18 ár, hevur ríkisborgararætt og býr í Føroyum, og hevur verið skrásettur í fólkayvirlitinum í Føroym í minst tvey ár tey seinastu fimm árini, kann ogna sær jørð.

Tann, sum vil ogna sær jørð, sum ber meiri enn 50 seyðir, skal harafturat prógva, at hann er førur fyri at hava landbúnað.

– Men hetta vil eisini siga, at kemur onkur, sum er yngri enn 18 ár, soleiðis fyri, at tey arva jørð, skal hon seljast, tað er onki við at gera.

– Hetta vil eisini siga, at er tað onkur, sum hevur verið uttanlands í útbúgvingarørindum, kunnu tey falla fyri markinum um, at tey ikki hava búð í Føroyum í tvey ár tey seinastu fimm árini og so missa tey jørðina.

Tá ið ein, sum hevur búnaðarjørð, doyr, ber tað ikki til at býta jørðina sundur ímillum børnini, tí tað verður bara tað elsta barni, sum kann arva jørðina. Vil elsta barn ikki hava jørðina, er tað næstelsta barn, sum arvar alla jørðina o.s.fr.

Men er barnið ikki myndugt, men kortini vil hava jørðina, kann búnaðarnevndin seta ein røktingarmann at reka garðin, til barnið er myndugt.

– Tað vil siga, at har nógv jørð er, ber ikki til at býta hana sundur. Tað ber heldur ikki til at skrivað testamenti og gera av, hvør skal hava jørðina.

Somuleiðis sigur uppskotið, at hvørja ferð onkur veltur upp úr nýggjum, ella tekur flag ella mold, skal tað søkjast til landsstýrismannin um loyvi.

Eftur nýggja lógaruppskotinum skal tað eisini verða sýslumaðurin sum ásetur áseyðatalið í einum haga. Tvs, at tann ábyrgdin ella rætturin, verður tikin frá bygdarfólkinum.

## Trivnaður og ítriv burtur

Óðalsfelagið førir fram, at verða broytingarnar í landbúnaðarálitinum framdar í verki, fer tað at føra við sær at sum frálíður fer øll óðalsjørð at vera savnað í størri eindir.

– Tað fer at henda, so hvørt sum kravið um bústaðarskyldu, avmarkingarnar í ognarrættinum og arvarættinum og aðrar ásetingar í lógina, føra til, at jørð verður tikin frá fólki, sigur Kári á Rógvi.

– Sostatt tekur búnaðarálitið púra onki fyrilit fyri teirri gomlu mentanini og tí ómetaliga trivnaði tað førir við sær, at fólk kunnu eiga eitt sindur av jørð til húsbrúk.

Óðalsfelagið vísir eisini á, at tað í nógvum førum júst er jørðin, sum bindur fólk til smáplássini í útjaðaranum í Føroyum.

–Verður jørðin savnað í størri eindir, verða tað bar nøkur heilt fá húski úti á bygd, sum hava jørð. Tað hevði verið nógv betri fyri útjaðaramenning at býtt jørðina sundur, so at enn fleiri fingu gagn av henni. Eitt nú áttu størri festi at verið býtt sundur í smærri festi, fyri at givið fólki møguleika at havt eitt sindur av seyði afturat til trivnað, men eisini fyri at útvega sær eitt kærkomið ískoyti til húsarhaldið. Óðalsfelagið vísir eisini á, at tey smáu brúkini kasta nógv meiri av sær sum tey stóru brúkini.

Hetta er óivað eitt mál, sum vit fara at hoyra meiri til í komandi tíðum. Í næstum fer Óðalsfelagið at halda fleiri fundir kring landið, har høvi verður at frætta um avleiðingarnar av landbúnaðarpolitikkinum í framtíðini. Sí annars yvirlýsing frá fundinum í Porkeri her á síðuni.



*Føroya Óðalsfelag er farið at hava fundarrøðir kring landið um framtíðar landbúnaðarpolitikkin í Føroyum. Tey 30 fólkini, sum møttu á tí fyrsta fundinum í Porkeri mikukvøldið mótmæla, at ætlanin er at beina fyr ialdargamlari mentan og týðandi ískoytisvinnu*

## Fundarsamtykt

Á fundi hjá Føroya Óðalsfelag í Porkeri, ónskvøldið 20. juni var nógv fólk samankomið, tó at hvalbingarnar høvdu oyggjarfund fyri Lítlu Dímun.

Bæði óðalsmenn, smærri festarar og fólk, ið sita við leigutraðum, vóru á fundinum.

Fundarfólkið gjørdi hesa samtykt:

»Fundarfólkið mælti ímóti at seta fram uppskotið um lóg um búnaðarjørð, ið førir til ognartøku og beinir fyri aldargamlari mentan og týðandi ískoytisvinnu.

Fundarfólkið heitti eisini á landsins kosnu menn og kvinnur um at hava fyrilit fyri óðalsjørð, leigutraðum og smáum festum, eins og fyri trivnaði og mentan á bygd, tá landbúnaðarpolitikkurin verður orðaður.

Serliga heitti fundurin á tey fólkavaldu um at broyta matrikullógina, so at sundurbýti gerst lættari, og at selja smærri festi til vanligar óðalstreytir, um tey skulja seljast.

Fundarfólkið er ónøgt við, at eitt uppskot um slíka lóg um óðalsjørð er gjørt, uttan at umboð fyri óðalsfólkið og smærri brúkarar hava verið við.«